## Stuðulsfólk Endurlýsing

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja **15.apríl 2008** ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági, Sosialu deild, NSR tænastuna ì Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 20 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin verður eftir avtalu við Frítíðarskúlan.

Lønin verður sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag .

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi **31. mars 2008. kl 15.00.**

**Sosiala Deild**

**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**

Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

## Pedagogur til Útibarnagarðin Látipípuna

Í samband við, at Útibarnagarðurin skal vaksa um virksemi, hava vit nú tørv á einum starvsfólki afturat.

**Søkt verður eftir:**

- Einum pedagogi 40 tímar um vikuna. Møguleiki er fyri at tosa um niðursetta tíð.
- Um eingin pedagogur søkir, verður eitt hjálparfólk sett

at byrja skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 1. juni 2008.

Látipípan er ein stovnur við útibarnagarði, sum er eitt tilboð til 5-7 ára gomul børn, umframt frítíðarstovu til børn í 1. og 2. flokki.

**Vit kunnu bjóða:**

- Ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjørðu.
- Ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- Ein stovn í menning, har øll hava møguleik fyri at seta síni fingramerki
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á greitt samskifti á øllum økjum
- Ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Vit vænta av tær, at:**

- Tær dámar at verða nógv úti saman við børnunum
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Tú hevur góð samstarvsevnir
- Tú ert opin og erlig/ur í samskiftinum við onnur

Nærri fæst at vita við at ringja til Einu Andreasen, leiðara, á tlf 230145.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi **8. apríl 2008, kl. 1600.**

Látipípan
og
Vestmanna Kommuna

Runavíkar kommuna

## Økispedagogur til Dagrøktina á Skála

Í dagrøktini á Skála starvast 14 dagrøktarar, økispedagogur, spælistovufólk og leiðari. Spælistova er knýtt at dagrøktini. Í dagrøktini ganga 70 børn, í aldrinum 0 – 7 ár.

**Søkt verður eftir:**
Námsfrøðingi at byrja 1. apríl, ella eftir nærri avtalu, sum økispedagogur.
Starvið er 25 tímar um vikuna.
Um námsfrøðingur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Vit bjóða:**

- Eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- Eitt arbeiðspláss har tú kemur at hava ávirkan
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni

**Vit ynskja at tú:**

- ert kreativ og ígongdsetandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- hevur góð samstarvsevnir og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan geradisdag fyri børnunum
- hevur hug til at skapa og seta dám á dagrøktina

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bessi Bjarnason leiðara á tlf 586004

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, við møguligum avriti av prógvi og viðmælum, skal verða Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 26.03.2008 kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
610 Saltangará

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

## Kommunulæknastørv í Føroyum 2008

Kommunulæknastørv í Norðoya-, Runavíkar- Skála-, Fuglafjarða-, Suðurstreymoyar-, og Suðuroyar Norðara Læknadømi undir Almanna– og heilsumálaráðnum eru leys at søkja, lýsing er send faktíðarritum í Norðurlondum, og er eisini løgd á heimasíðuna hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Umsóknarfreistin er: **7. apríl 2008, kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um størvini, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.ahr.fo, har nágreiniliga lýsingin stendur.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# BINGO

**Stórt páskabingo verður í Studentaskúlanum í Hoydølum sunnudagin 16. mars kl. 15.00**

**Nógvir góðar vinningar, sum t.d.:**

- **Ferðaseðil við Atlantic**
- **Vikuskiftis uppihald á Hotel Vágur fyri tvey**
- **Gávukort frá Cosméto**
- **og nógv annað gott!**

**Kom og vinn!**

